52-065/2024

LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3, Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 15. januar 2025
J. nr.: 25/00407-5

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-098/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um bústaðarskráseting av fólki á røktarheimi v.m.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um tað eru greiðar reglur um bústaðarskráseting av fólki, sum býr á røktarheimi ella sambýli?
2. Um ikki, hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera greiðar reglur um hetta, og hvussu hugsar landsstýrismaðurin, at hesar skulu verða?

Svar:

Til spurning nr. 1

Reglur um bústaðarskráseting eru ásettar í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.

Í lógini er ásett, at tað er kommunustýrið, sum skal skráseta øll í Landsfólkayvirlitinum við bústaði teirra. Bústaður merkir her tað býlið, har persónurin vanliga gistir, tá ið hann ikki er burturstaddur á frítíðarferð, handilsferð, vegna sjúku ella tílíkt, og har ognarlutir hansara eru.

Í viðmerkingunum til ásetingina stendur, at tá ið einstaklingar eru fluttir frá bústaði sínum og inn á stovn ella heim, verður hetta altíð at rokna sum ein flyting, uttan tá ið heilt serstakar umstøður fyriliggja, ið stuðla uppundir, at tað ikki kann roknast sum fast uppihald.

Sambært lógini hevur kommunan eftirlit við flytifráboðanunum hjá borgarunum, og kommunan hevur somuleiðis heimild til at kanna bústaðarviðurskiftini nærri. Verður komið eftir, at bústaðarviðurskiftini ikki eru rætt skrásett, hevur kommunan heimild til at broyta ella rætta bústaðarskrásetingar, soleiðis at bústaðurin hjá fólki er í samsvari við veruligu bústaðarviðurskiftini.

Øll, ið flyta, hava skyldu til í seinasta lagi 5 dagar eftir flyting at boða kommununi, sum flutt verður til, frá flytingini.

Er tann, ið flytur, ikki sjálvur førur fyri at boða frá flytingini, skal tann, ið hevur ábyrgdina av viðkomandi, boða frá flytingini.

Kommunustýrið kann eisini áleggja teimum, ið eru leiðarar á heimum, stovnum o.tíl., at lata fólkayvirlitið vita av, so hvørt sum persónar flyta inn ella út úr tí heimi, stovni ella øðrum, sum teir varða av.

Hetta er við til at tryggja, at bústaðurin hjá einstaklingum, sum flyta á røktarheim, sambýli o.tíl. er rætt skrásettur.

Samanumtikið verður tí mett, at greiðar reglur eru um skráseting av bústaði hjá fólki, sum býr á røktarheimi ella sambýli. Ábyrgdin at boða frá liggur bæði hjá stovninum og borgaranum ella tí, sum hevur ábyrgdina av viðkomandi.

Til spurning nr. 2

Ongar ítøkiligar ætlanir eru um at gera broytingar í lóg um fólkayvirlit.

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður